Fylgiskjal 8

Fra: Henrik Weihe Joensen <henrik@fuglafjordur.fo>
Sendt: 7. januar 2021 21:17
Til: Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>
Cc: Dávur Juul <davur@fuglafjordur.fo>; Stovnur kommunufelagið <kf@kf.fo>
Emne: Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving - skipan av kommunalum tilbúgvingarøkjum v.m., j.nr. 20/00610.

Til Fiskimálaráðið

Gott kvøld

Víst verður til uppskot um broyting í løgtingslóg um tilbúgving viðvíkjandi skipan av kommunalum tilbúgvingarøkjum, átaks- og kreppuráðum umframt stovnsetan av fráboðanarsentrali, sum umvegis Kommunufelagið varð sent Fuglafjarðar kommunu til hoyringar tann 9. desember í fjør. Ummælisfreistin er í dag.

Talan er um týdningarmikið uppskot til broyting í tilbúgvingarlógini, tí landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum leggur upp til, at kommunurnar skipa samstørv um tilbúgvingarøkir, har Fuglafjarðar kommuna skal skipa seg saman við Eysturkommunu.

Fuglafjarðar kommuna metir, at hetta uppskot til broyting í tilbúgvingarlógini eigur at viðgerast nærri í Kommunufelagnum, tí nýggju býráðini hava júst tikið við, og eiga at fáa betur høvi til at seta seg inn í teir fakligu og fíggjarligu fyrimunir og vansar, sum lógaruppskotið hevur við sær.

Hesar viðmerkingar verða í kunningarhøpi eisini sendar Kommunufelagnum.

Vinarliga / Best regards

Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

Fuglafjarðar kommuna
Í Støð 5
Fo 530 Fuglafjørður

Tlf : +298 668000
Fart : +298 238002